# Hans Pauli vil hava vælferðarráð

**Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum arbeiðir við ætlan at seta á stovn eitt Vælferðarráð í Føroyum**

VÆLFERÐ
*Heini í Skorini*

Nú er sannlíkt, at eitt nýtt føroyskt Vælferðarráð er á veg.

Danir hava í nøkur ár havt eina "Velfærdskommission", sum er mannað við fakfólki og við jøvnum millumbilum ger eftirmetingar og endurskoðar danska vælferðarøkið, og tað er eitt líknandi hugskot, sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, nú ynskir at seta á stovn í Føroyum.

Jóannes Eidesgaard løgmaður nevndi hugskotið í løgmansrøðu síni, og Hans Pauli Strøm váttar, at eitt nýtt Vælferðarráð møguliga verður partur visión-2015.

- Talan er framvegis bert um eitt hugskot, uttan at nakað ítøkiligt arbeiði er farið í gongd enn, men eg fari í heyst at vita, hvørja móttøku uppskotið fær í Landsstýrinum og samgonguni, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann metir, at hetta kundi verið ein týðandi liður í visión-2015, og hann metir eitt slíkt ráð vera átrokandi í Føroyum.

- Hóast vælferðarøkið bert er vaksandi og fer við yvir helvtini av allari fíggjarlógini, hava vit eingi amboð at hyggja at hesum ovurstóra øki. Tí er neyðugt, at økið áhaldandi verður endurskoðað og eftirmett, og hetta kundi m.a. verið gjørt við einum nýggjum Vælferðarráði, sigur Hans Pauli Strøm.

# Útnorðurráðið fundast í Íslandi

**Í vikuni fara føroyskir politikarar til Ísland at fundast í Útnorðurráðnum**

FUNDUR
*Heini í Skorini*

Útnorðurráðið, sum er ein samarbeiðsfelagsskapur millum stjórnirnar í Grønlandi, Íslandi og Føroyum, fer í døgunum frá 22.-24 august at fundast í Íslandi.

Seks limir úr hvørjum parlamenti eru limir í Útnorðurráðnum, og í tíðindaskrivi verður greitt frá, at evnini á fundinum verða "vestnordisk fiskeripolitisk samarbejde og EU, energisamarbejde, vestnordisk kultur, klima og miljø, helse og sundhed samt turisme og trafik".

Teir seks føroysku limirnir eru Henrik Old, sum eisini er føroyskur delegatiónsformaður, Alfred Olsen, Høgni Hoydal, Jenis av Rana, Kári P. Højgaard og Poul Michelsen.



# Brutu prestarnar

Onkur hevur helst koyrt á fleiri prestar framvið Vestmannavegnum sunnunáttina, tí í morgun vóru bilførarar á veg til Vestmanna vitni til, at bæði prestar og skilti lógu sløgd á og kring vegin.

Løgreglan fekk á middegi í dag fráboðan um tilburðin, og boðini eru borin víðari til landsverkfrøðingin. Um landsverkfrøðingurin ikki velur at melda tilburðin, verður einki meiri gjørt við herverkið.

**-HíS**






# Makrelarnir gjørdust ov stuttir



*Føroysku Makrel gjørdust akkurát ov stuttir, tá teir á MTV vóru við í kapping, har ein plátusáttmáli var høvuðsvinningurin*

**Á netinum vunnu teir atkvøðugreiðsluna, men dómararnir hjá MTV pekaðu kortini á annan bólk**

TÓNLEIKUR
*Heini í Skorini*

– Tað var spell, at vit ikki vunnu, men vit eru als ikki vónbrotnir, sigur Hergar Stakksberg, bassistur í Makrel, eftir at teimum ikki eydnaðist at fáa útgávusáttmála frá MTV í Nordic Unsigned kappingini

Tónleikaáhugaðir føroyingar hava seinastu tíðina gingið og vónað, at antin Makrel ella Eyð Berghamar Jakobsen fóru at vinna stóru kappingina hjá MTV og Samsung, Nordic Unsigned.

Men hóast Makrel og Eyð fyrr lógu á ávikavist fyrsta og øðrum plássi eftir atkvøðugreiðslu á netinum, peikaðu allir fýra dómararnir á svenska bólkin Jade, sum sostatt fór avstað við fyrsta vinningi, sum er ein plátusáttmáli.

Men manningin í Makrel er eftir øllum at døma ikki vónbrotin, hóast ein so stórur møguleiki glapp teimum av hendi.

- Vit væntaðu ongantíð tað stóra, og vit sendu okkara upptøku inn mest sum til stuttleika. Tí eru vit als ikki vónbrotnir, sigur Hergar Stakksberg, bassistur í Makrel.

Hóast teir lógu nummar eitt eftir atkvøðugreiðsluna, vistu teir, at dómararnir høvdu seinasta orðið, og sambært Hergar er vanligt, at dómararnir peika á sama bólkin.

- Tí væntaðu vit ikki, at vit fóru at vinna, heldur ikki eftir at vit fingu mest atkvøður. Men tað er eingin loyna, at ein útgávusáttmáli hevði komið væl við, serliga nú vit arbeiða við eini nýggjari fløgu, sum skal promotast, sigur Hergar Stakksberg at enda.